MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar

## Uppskot til hoyringar

**Mentamálaráðið**

**01-12-2010**

uppskot

Hoyringarfreist 1. februar 2011

1. Inngangur ........................................................................................................ 2
2. Samfelagsuppgávan hjá dagstovnum ................................................................... 4
3. Virði.................................................................................................................... 5
4. Áskoðan á børn og barnaár ................................................................................. 7
5. Spæl .................................................................................................................... 9
6. Læra og kunnleiki ............................................................................................ 10
7. Umsorgan og uppaling...................................................................................... 11
8. Sosialur førleiki ................................................................................................ 12
9. Pedagogiska umhvørvið.................................................................................... 13
10. Menning og læra.............................................................................................. 14
11. Eftirmeting og menning .................................................................................. 16
12. Tilrættisleggjan av pedagogiska innihaldinum og ársætlan............................... 17
13. Samstarv við heimini ....................................................................................... 18
14. Elstu børnini og góð skúlabyrjan...................................................................... 19
15. Ábyrgdin hjá pedagogiska leiðaranum ............................................................. 21

uppskot

## 1. Inngangur

Løgtingið hevur í løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt í §§ 1 og 2 ásett endamálið fyri dagstovnar og dagrøktir. Í § 3, stk. 3 er ásett, at landsstýrismaðurin skal áseta reglur fyri námsfrøðilig stevnumið.

Stevnumið skulu skiljast sum tey eru søgd – sum ein stevna sum arbeiði á dagstovninum skal miða seg eftir, bæði við fyrireiking, útinnan og eftirmeting. Tey eru ætlað at vera ein eggjan til umhugsan, ikki bara um egið virksemi, men eisini felags pedagogiskt virksemi. Stevnumiðini byggja á pedagogisk og etisk grundsjónarmið til umhugsan, heldur enn á ávís krøv um, hvat ið eigur at verða gjørt í tí einstaka dagstovninum.
Stevnumiðini eru ikki fyriskrivandi, men ein innbjóðing til sjálvstøðuga hugsan.
Tey taka ikki støðu til arbeiðshættir, tí dagstovnarnir eiga at fara fjølbroyttar leiðir í sínum arbeiðshættum, soleiðis sum tað hóskar seg best hjá tí einstaka dagstovninum.

Stevnumiðini taka støði í teimum serligu førleikunum, sum námsfrøðingar hava ognað sær í síni útbúgving. Stevnumiðini síggja starvsliga førleikan hjá námsfrøðingunum sum ein dygdargóðan, pedagogiskan serførleika, bygdan á granskingargrundaðan kunnleika og afturlit í arbeiðinum við børnum, foreldrum og starvsfelagum í dagstovnunum. Hesir pedagogisku førleikar skulu taka demokratiskt sinnalag til sín. Teir skulu geva børnum og foreldrum høvi til at vera virkin í at skapa meining í gerandislívinum saman við viðurkennandi vaksnum, sum geva teimum avbjóðingar. Tílík vaksin síggja tørvin á umsorgan, spæli og læru hjá einstaka barninum eins væl og hjá barnabólkum í lívlongum ljósi.

Stevnumiðini skulu geva íblástur til fyrireiking av pedagogiska arbeiðinum, sum børn, námsfrøðingar, foreldur og aðrir natúrligir samstarvspartar skulu menna saman. Henda fyrireiking byggir á serførleikan hjá námsfrøðingum, sum hann vísir seg, tá ið hann er bestur, í einum dagstovni eyðkendur av hegnisligari nærkan til týdningarmikil viðurskifti í barnsins lívi, eitt nú uppaling, umsorgan, myndan/dannilsi, sosialisering, spæli og læru.

Stevnumiðini eru grundarlagið, sum dagstovnar skulu byggja sína ársætlan á. Námsfrøðiligu stevnumiðini stinga virðisgrundarlagið út í kortið, sum dagstovnarnir skulu byggja virksemi á. Tey eru vegleiðandi fyri innihaldið og fyri uppgávurnar í dagstovninum, og tey eru ætlað at vera ein íblástur til starvsemið.

Endamálið við stevnumiðunum er at geva leiðarunum, námsfrøðingunum og starvsfólkunum yvirhøvur, ein karm um virksemið í dagstovnunum. Leiðarin hevur ábyrgd av, at virksemið hevur støði í stevnumiðunum.

Stevnumiðini eru eisini ein kunning til foreldrini, kommunurnar og myndugleikarnar um, hvat ein dagstovnur eigur at vera.

Stevnumiðini endurspegla mentanar- og menningaruppgávuna hjá dagstovninum og

uppskot

byggja á eina barnaákoðan, har børn hava førleikar og hava ein virknan leiklut í at skapa seg sjálvan. Stevnumiðini greiða frá samfelagsuppgávuni hjá dagstovnunum.
Tey vísa á týdningin, sum hugburður, kunnleiki og førleiki hjá námsfrøðingunum hevur fyri at møta, skilja og ala upp børn, so tey kunnu gerast virknir luttakarar í einum fólkaræðisligum samfelag.
Dagstovnurin skal byggja á eina heildarmenning og á eina læruáskoðan, har spæl, umsorgan og læra eru týdningamiklir tættir. Sosialir førleikar, námsfrøðiliga umhvørvið og læruøkini eru týðandi partur av læruumhvørvinum í dagstovninum. Tann einstaki barnagarðurin skal greiða nærri frá sínum virksemi í eini ársætlan, og skal eisini gera greitt, hvussu hann ætlar at samstarva við skúla og heimini.

Stevnumiðini leggja dent á sereyðkennini hjá dagstovninum sum eitt pedagogiskt virksemi.

uppskot

## 2. Samfelagsuppgávan hjá dagstovnum

Uppgávan hjá dagstovnunum er at bjóða børnum undir undirvísingarskyldu eitt trygt, mennandi, avbjóðandi og læruríkt umhvørvi, sum er fyri barnsins besta.

> *"Løgtingslógin fevnir um virksemið á dagstovnum og dagrøktum, sum í samráð við foreldraráðið virkar fyri uppaling og menning av børnum sambært fullgóðari námsfrøðiligari stevnu."*
>
> Løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt

Uppgávan hjá dagstovnum er at bjóða børnum eina uppaling og menning sambært fullgóðari námsfrøðiligari stevnu.

Dagstovnurin skal hava eina dygd, bæði fysiskt, sosialt og mentanarliga, sum til eina og hvørja tíð er í samsvari við tann kunnleika og tað innlit, sum er um barndóm, barnaáskoðan, læruákoðan og serligu rættindini hjá børnum. Dagstovnaleiðarar eiga at halda seg væl kunnaðar um gransking og nýhugsan á dagstovnaøkinum, soleiðis at teir støðugt fylgja við í tí, sum fer fram innan námsfrøðiliga gransking.

Dagstovnurin er ein pedagogiskur stovnur, sum fyrst av øllum er til fyri børnini, men dagstovnurin er eisini eitt vælferðartilboð til smábarnafamiljur.

Dagstovnurin skal byggja á eina heildarfatan av børnum, har umsorgan, spæl, mentan og læra eru ein heild, og hann skal vera eitt umsorgar-, mentanar og læruumhvørvi, sum er til fyri barnsins besta. Barnsins besta skal altíð vera útgangsstøðið og grundarlagið fyri virkseminum í dagstovninum.

Ábyrgdin hjá dagstovnunum er at stuðla tí einstaka barninum at mennast við øllum teimum førleikum og møguleikum, sum tey hava.

Námsfrøðiliga uppgávan hjá dagstovnunum er at tryggja, at børnini fáa eitt umhvørvi, har tey við umsorgan og trygt, tryggleika fáa avbjóðingar, sum eru hóskandi til teirra aldur og menning. Virksemið skal vera stuttligt, trygt og læruríkt hjá børnunum, og tað skal vekja teirra áhuga.

Á dagstovnum skulu børnini hava góðar møguleikar at spæla og læra, og vera virkin í einum felagsskapi. Dagstovnurin skal tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi, sum gevur børnunum góðar avbjóðingar bæði innan- og uttandura. Dagstovnurin hevur stóran týdning fyri menningina hjá børnum og skal stuðla uppundir teir stóru og fjølbroyttu lærumøguleikar sum børn hava. Námsfrøðingar og foreldur eiga at arbeiða saman fyri at stuðla uppundir menningarmøguleikarnar hjá børnunum.

Ein týðandi partur av samfelagsuppgávuni hjá dagstovnunum er at byggja arbeiðið á fólkaræðisligt grundarlag. Hugburðurin til børn og fólkaræði í ST-sáttmálanum um barnarættindi er eitt nýbrot, og neyðugt er at geva sær stundir at umhugsa og menna eina hugsan um rættindini hjá børnum í dagstovnum, um hvussu rættindini hjá børnum skulu skiljast og hvussu tey kunnu gerast ein partur av gerandislívinum í dagstovninum. Børn skulu hava ávirkan á egið lív, og ein partur av uppalingini er at geva børnunum møguleika at vera virkin í fólkaræðinum.

uppskot

## 3. Virði

Dagstovnurin skal byggja sítt virksemi á fólkaræði og altíð virka til frama fyri barnsins besta. Børnini skulu fáa møguleikar at vera virknir luttakarar í einum fólkaræðisligum samfelag og at vera virknir í at skapa mennandi, avbjóðandi og hugvekjandi møguleikar.

Allir dagstovnar eiga at byggja sítt virksemi og innihald á tað virðisgrundarlag, sum er ásett í dagstovnalógini og í teimum altjóða sáttmálum, sum Føroyar hava bundið seg til, og dagstovnurin eigur serliga at hava í huga ST-sáttmálan um barnarættindi.

Barnarættindasáttmálin varð samtyktur av ST í 1989 og staðfestur á Føroya Løgtingi 9. apríl 1992. Við hesi staðfesting av Barnarættindasáttmálanum hava Føroyar bundið seg til at hava barnsins besta í huga í øllum, sum hevur við børnini at gera, soleiðis sum § 3 í sáttmálanum ásetur. Myndugleikar landsins eiga at tryggja, at teir stovnar og tær tænastur, sum hava ábyrgdina av umsorgan og verju av børnum, taka støði í teimum ásetingum, sum hesir altjóða sáttmálar seta.

Barnarættindasáttmálin leggur dent á, at barnaárini hava virði í sær sjálvum og á rættin hjá børnunum at koma til orðanna og at hava medávirkan á egið lív.
Dagstovnar skulu sambært Barnarættindasáttmálanum byggja sítt virksemi á eina heildarfatan av børnum, har umsorgan, spæl, mentan og læra mynda eina heild.

Tað er ábyrgdin hjá dagstovninum at skapa umstøður og tryggja, at børnini fáa síni rættindi.

Dagstovnar skulu stuðla børnunum í at hugsa og gera eftir síni sannføring og stuðla teirra tolsemi, so tey í orði og verki sýna sínum medmenniskjum somu virðing, sum tey sjálv vilja hava, og stuðla teimum at viðurkenna rættin hjá øðrum at hava aðra sannføring enn ein sjálvur ella fjøldin hevur.

Dagstovnurin skal geva børnunum møguleika at menna síni skapandi evni, sum eru eitt gott grundarlag til at styrkja sín samleika, sjálvsvirðing og sjálvskenslu, og hann skal stuðla teirra evnum at taka sær av egnum viðurskiftum á ein virðiligan og samstarvandi hátt.

Dagstovnurin skal byggja sítt virksemi á sjónarmiðið um javnstøðu millum kynini. Javnstøða millum kynini skal endurspegla tað pedagogiska arbeiðið í dagstovninum. Dagstovnurin skal stuðla børnunum at møta og skapa javnstøðu í samfelagnum.
Gentur og dreingir eiga at hava sama møguleika at vera sædd og hoyrd, og verða eggjað til luttøku í felagsskapinum í øllum virkseminum í dagstovninum.
Neyðugt er at starvsfólkini umhugsa sín egna hugburð til gentur og dreingir og hugburðin, sum er frammi í samfelagnum, so kynið ikki verður ein avmarking í teimum møguleikum og avbjóðingum, sum børnini fáa.

Arbeiði í dagstovninum skal eyðkennast av virðing og ábyrgd fyri okkara felags tilfeingi, bæði natúru og mentan. Dagstovnurin skal leggja stóran dent á umhvørvis- og natúruverndarspurningar og stuðla undir okkara felags ábyrgd fyri lívi og heilsu. Virðingin fyri burðardyggari menning, bæði mentanarliga, sosialt, búskaparliga og umhvørvisliga, skal stuðlast, og umráðandi er at geva børnunum eina bjarta vón á framtíðina og vísa á, at í felagsskapi ber til at ávirka framtíðina.

Uppskot

Dagstovnurin skal leggja dent á ein heilsufremjandi hugburð, sum fevnir um bæði likamliga, sálarliga og sosiala vælveru.

Dagstovnurin hevur eina serliga ábyrgd fyri at skapa pláss og lærumøguleikar hjá øllum børnum, uttan mun til førleika og uppruna.
Børn, sum hava serlig rættindi, eiga at fáa stuðlandi tiltøk, sum skapa fjølbroyttar møguleikar at mennast.

uppskot

## 4. Áskoðan á børn og barnaár

Barnaáskoðanin hevur avgerandi ávirkan á, hvørjar møguleikar børnini fáa at menna og menta seg í dagstovninum. Vit hava øll eina mynd av, hvat eitt barn er, og henda mynd hevur røtur í okkara mentan, kunnleika, persónligu royndum, og eisini í okkara vónum til framtíðina.

Myndin av barninum broytist eftir tíð og stað. Einaferð í tíðini var hugtakið barndómur ikki til. Børnini vóru smá vaksin. Við hugtakinum barnaáskoðan seta vit ljósið á barnið og lata upp fyri spurninginum: Hvussu síggja vit barnið, hvør er okkara barnaáskoðan, og hvørja ávirkan hevur hendan myndin av barninum á pedagogiska virksemið í dagstovnunum?
Tað er okkara fatan av, hvat eitt barn er, og hvat tað kann verða, sum skapar barnið.

Ein fatan av barninum hevur verið, at menningin kemur av sær sjálvari, og at tað meira ella minni er møguligt at siga frammanundan, hvussu menningin verður, uttan at hugsa um, hvørjum umhvørvi børnini vaksa upp í. Hendan hugsanin bygdi á, at menningin fór fram eftir einum serligum mynstri, uttan at hugsa um, hvørja ávirkan tað menniskjaliga samskiftið og tíð og stað høvdu á møguleikarnar hjá barninum. Henda fatan av barninum læt upp í hendurnar á vísindunum at gera av fyri okkum, hvat eitt barn er, og hvat barndómurin er.

Tann fatanin av børnum, sum tey sum arbeiða við børn hava, hevur stóra ávirkan á teir møguleikar, sum børnini fáa. Okkara barnaáskoðan hevur ávirkan á, hvussu vit samskifta við børn, og á tað umhvørvið, sum vit skapa børnum, har tey skulu mennast og mentast. Starvsfólk á dagstovnum mugu støðugt hugsa um, hvat tað er fyri barn tey síggja, og hvat tankagóðs og hugburður, stýrir teirra hugsan.

Barnaáskoðanin**,** sum hevur støðið í nýggjari gransking, og sum Barnarættindasáttmálin tekur støði í, vísir á, at barnið verður til í menniskjaligum samskifti, sum er bundið at tíð og stað, og at ikki ber til at siga, at børn eru á ein ávísan hátt. Børn eru ymisk, og hvørt barn og hvør barndómur lagast eftir, hvussu vit hugsa um og skilja børn og barndóm.

Tær valdandi myndirnar av børnunum hava ávirkan á okkum, vit taka tær til okkum og gera tær til ein part av okkum.

Áskoðanin á børn, sum alheimssamfelagið við Barnarættindasáttmálanum á odda hevur tikið til sín, er ein mynd av einum ríkum barnið, sum er ríkt uppá møguleikar, sterkt, máttmikið og dugandi, og sum skal hava møguleikar at hava ávirkan á egið lív. Hendan barnaáskoðanin setur nýggj krøv til pedagogisku uppgávuna og pedagogiska innihaldið. Dentur skal leggjast á tað leitandi og forvitna barnið. Tað hevur týdning at síggja børnini við øllum teirra møguleikum og førleikum, og at síggja tað, sum børnini eru áhugaði í. Tað er undranin hjá børnunum sum skal vera stýrandi í dagliga pedagogiska virkseminum.

Barnaáskoðanin skal vera til støðuga umrøðu, og tað koma støðugt nýggjar myndir sum føra til nýggj orðaskifti. Tað er neyðugt at halda lív í tílíkum kjaki, at seta nýggjar spurningar, og ikki at steðga upp við einum endaligum svari, tí eingin endaligur sannleiki er til.

Uppskot

Børnini eru virkin í skapanini av egnum lívið, og tað merkir at námsfrøðingarnir mugu  lurtað eftir børnunum, og ikki bara gera soleiðis sum vit halda er best eftir okkara sannføring.
Alt virksemið má taka støðið út frá myndini av tí ríka barninum, og tað er á hetta, at alt starv a dagstovnum skal byggja sítt virksemi.

uppskot

## 5. Spæl

Fyri børn er spæl lívsneyðugt, og í spælinum menna tey ein samansettan førleika. Spæl og spælimøguleikar eru kjarnin í dagstovnavirkseminum, og børnini eiga at fáa ríkar og fjølbroyttar møguleikar at spæla. Spæl er avbjóðingar og ikki bert upplivingar.

Børnini mennast sosialt, kensluliga og rørsluliga, og spælið er ein týdningarmikil táttur í læruni hjá børnum, sum stuðlar teirra samskiftisførleika og mennir teirra vit og skil. Í spælinum ogna børnini sær fjølbroyttar royndir, og spælið er ein læritilgongd. Nógv góð læra er í spælinum. Spæl er eyðkent av fríum vilja, børnini spæla av sær sjálvum. Spælið er spontant og byrjar knappiliga.

Spælið stuðlar skapandi evnunum hjá børnunum og gevur teimum ríkar møguleikar at arbeiða við granskandi spurningum.

Øll vita, hvussu tað kennist at spæla, men granskarar hava ilt við at semjast um eina allýsing av spæli. Men tá ið vit spæla, vita vit, hvat tað er.

Spæl er ein almennur førleiki, og børn hava serliga góðan og stóran førleika at spæla. Hjá teimum er tað ein týdningarmikil partur av lívinum, sum gevur teimum gleði og stuttleika og stuðlar teirra skapandi evnum og skapandi hugsan. Spælið hjálpir teimum at skilja umheimin, at taka umheimin til sín og at kannað og granska umhvørvið. Spælið hevur virði í sær sjálvum og er ein natúrligur virkisháttur hjá børnum.

Í samspæli við børnini hava námsfrøðingar ábyrgdina av, at børnini fáa fjølbroyttar og ríkar møguleikar at “finna uppá” og møguleikar til nýskapan í spælinum. Námsfrøðingarnir eiga at hava í huga, at børnini fáa íblástur til spælið, so tey støðugt finna nýggjar og forvitnisligar spurningar at arbeiða við. Børnini eiga at fáa møguleikar at vera áhaldandi og fáa stundir til at undrast og fordjúpa seg.

Bæði innan- og uttandura eigur at vera skipað soleiðis fyri, at umhvørvi er stimbrandi fyri hugflogið hjá børnum og skal leggja upp til fjølbroyttar møguleikar við fjølbroyttum tilfari, sum gevur hugskot til nýggjar hættir til innihald og spæl.

Námsfrøðingarnir skulu geva barnamentanini ans. Spælið er ein partur av barnamentanini, og við spælinum yvirføra tey eldru børnini mentan, sum børn hava skapað, víðari til tey yngru børnini.

Spælið er grundarlagið undir vinalagnum, og tí hevur tað týdning, at námsfrøðingarnir stuðla uppundir spælið og geva børnunum stundir at spæla.

Tað er umráðandi, at starvsfólkini eru tøk hjá børnunum til at stuðla og birta upp undir spælið og spælimøguleikarnar hjá børnunum. Tey mugu tryggja, at øll børnini fáa góðar og positivar avbjóðingar og upplivingar í spælinum. Avbjóðingin hjá námsfrøðingunum er at finna javnvágina millum at blanda seg uppí spælið, geva íblástur til spælið og at geva børnunum frið at menna sítt spæl.

Neyðugt er at síggja spælið í einum kynsperspektivi, so kyn ikki verður ein forðan fyri at børnini fáa møguleika at menna seg.

uppskot

## 6. Læra og kunnleiki

Umframt at børnini skulu trívast og fáa umsorgan, hava tey eisini rætt at læra, rætt til avbjóðingar og rætt til at seta undrandi og forvitnisligar spurningar

Børn hava nógvar førleikar, og hetta setur krøv til pedagogiska innihaldið. Børn skulu fáa fjølbroyttar menningar- og lærumøguleikar og tað er barnsins áhugi, sum skal vísa vegin og hava ávirkan á innihald og møguleikar í tí pedagogiska arbeiðinum. Umráðandi er at møta áhuganum hjá børnunum at læra og geva teimum fjølbroyttar møguleikar at læra í samskifti við onnur børn.

Børn eru sjálvstøðug menniskju og hava rætt til medávirkan á egið lív. Tey eru virknir medskaparar av nýggjum kunnleika og vitan, og skulu fáa høvi at skapa meining og innihald, meðan tey eru í lærutilgongdini. Børn læra í samspæli og samskifti við onnur børn og vaksin, og læran er samantvinnað við spæl, mentan, umsorgan og undran. Undranin og forvitnið hjá barninum skal vera grundarlagið undir teimum spurningum, sum námsfrøðingarnir viðgera og kanna saman við børnunum.

Námsfrøðingarnir skulu stuðla børnunum at fáa gleði av øllum sínum evnum. Tey mugu fáa høvi at liva eitt lív við mennandi læru, og havast má í huga, at tey fyrstu seks árini eru tey týdningarmestu læruár okkara. Námsfrøðingarnir mugu stuðla lærutilgongdina hjá øllum børnunum, frá teimum yngstu í vøggustovuni og til tey elstu í dagstovninum, tí øll skulu fáa møguleikar at læra og mennast. Lærumøguleikar eru alt lívið, men tey fyrstu árini eru tey týdningarmestu, og tað er tá, at grundarlagið fyri lívlangari læru verður  lagt.

Børnini mugu fáa álit á og innlit í egnan førleika at læra seg at læra, og mugu verða stuðlaði í teirra undran, áhuga og forvitni, heldur enn eini stremban eftir at røkka ásett kunnleika- og førleikamál. Tað er lærutilgongdin sum hevur størstan týdning.

Arbeiðið skal skipast soleiðis, at børnini fáa møguleikar at knýta vinarbond, tí tað góða sambandið við onnur børn og vaksin er ein fortreyt fyri læru og gleði.

Undran, forvitni, virkishugur og áhugi skulu stuðlast og stimbrast. Grundarlagið er ein granskandi arbeiðsháttur. Undranin og forvitnið hjá børnunum skal vera stýrandi. Øll læra byggir á tað sum vekir okkara áhuga, tí áhugin er drívmegin.

Tann vaksni má taka støðu til, hvussu barnið støðugt kann stuðlast í síni lærutilgongd og síni kunnleikaskapan, og støðugt umhugsa sítt arbeiði og sína uppgávu. Barnaáskoðanin og læruáskoðanin, sum er frammi í dag, setur nýggj krøv til pedagogikkina. Námsfrøðingar eiga at hava í huga, hvussu teir skapa eitt stimbrandi umhvørvi, har børnini fáa møguleika at varðveita og menna tað, sum børnini hava í sær, hvussu teir varðveita undranina og forvitnið hjá børnunum, so tey læra at fordjúpa seg, og finna gleði og stuttleika í tí, tey gera. Tað er ábyrgdin hjá námsfrøðingunum at síggja tað, sum børnini eru upptikin av. Námsfrøðingarnir  eiga at hava í huga, at børnini finna gleðið í tí, sum tey gera.

Uppskot

## 7. Umsorgan og uppaling

Í góðari umsorgan eru nógvir góðir møguleikar til læru og menning. Umsorgan, menning og mentan skulu renna saman í eina heild, so umsorganin styrkir læruna, og læran styrkir umsorganina. Umsorgan er grundarlagið undir menningar- og mentanarmøguleikum hjá børnum, og læran hongur óloysiliga saman við umsorgan.

Tað hevur stóran týdning fyri tað einstaka barnið, at dagstovnurin leggur dent á eina fjølbroytta umsorgan, sum hevur virði í sær sjálvum.

Umsorgan hevur bæði eina likamliga, eina kensluliga og eina mennandi og mentandi síðu. Tann likamliga umsorganin er eyðkend av at síggja, nær barnið hevur tørv á mati, reinføri og hvíld. Tann kensluliga umsorganin er eyðkend av tryggleika og einum persónligum og kensluligum sambandi við børnini. Tað hevur týdning, at tey vaksnu í dagstovninum eru nærverandi og kunnu liva seg inn í verðina hjá børnunum og síggja, at børnini hava tørv á tilknýti og felagsskapi. Børnini skulu fáa møguleikar at vísa umsorgan fyri hvørjum øðrum og at síggja tað serstaka í hvørjum einstøkum barni.

Góð umsorgan er ein fortreyt fyri menning og læru. Børn eru virknir medskaparar av egnum lívi, og tí er tað ikki nóg mikið, at umsorganin bert tekur støðið í likamligu og kensluligu síðuni av umsorganini. Profesionella umsorganin skal geva børnunum nógvar og fjølbroyttar møguleikar at mennast og mentast. Avbjóðingin hjá starvsfólkunum er at kveikja áhuga og forvitni hjá børnunum, so at børnini finna sína egnu drívmegi, orku og ætlanir til at læra og at skapa seg sjálvan. Grundgevingin fyri umsorgan skal taka støði í, at børn eru medmenniskju, og at tey eru ein partur av samfelagnum.
Hugburðurin hjá starvsfólkunum til umsorgan skal eyðkennast av eini eggjan, sum stimbrar børnini at menna allar sínar førleikar og verða eyðkend av gleði, forvitni og skapan, umframt virðing fyri hvørjum øðrum.

Dagstovnurin skal ala upp børnini at virka í einum demokratiskum samfelagi, har tey fáa innlit og ávirkan á síni rættindi, sínar skyldur og ábyrgd. Eisini skal stovnurin stuðla teirra førleikum at taka lut í einum livandi orðaskifti.

Uppaling er bæði at leiða og vegleiða næsta ættarlið, og í uppalingini verða virðir, normar, tankar og mátar at vera uppá yvirførdir, endurskoðaðir og endurskapaðir

Uppalingin hjá starvsfólkunum á dagstovnunum skal bæði geva børnunum innlit og kunnleika um normar og virði sum eru galdandi í samfelagnum, og skapa grundarlag og møguleikar hjá børnunum fyri virknari luttøku og skapan av einum demokratiskum samfelag.

Námsfrøðingarnir skulu vera góðar fyrimyndir, vera vegleiðandi og seta upp neyðugar karmar fyri børnini. Námsfrøðingarnir skulu seta krøv og geva børnunum avbjóðingar sum hóska til førleikarnar hjá tí einstaka barninum.

Uppskot

## 8. Sosialir førleikar

Dagstovnurin skal byggja sítt virksemi á fólkaræðisligan grundvøll, har børn, starvsfólk og foreldur eru virknir luttakarar. Dagstovnurin skal stuðla øllum børnum at fáa møguleikar at uppliva og finna gleði í góðum felagsskapi.
Góðar royndir og upplivingar við vinum og í góðum vinalag við javnaldrar hava stóran týdning fyri, at børnini menna sínar samspælsmøguleikar. Dagstovnurin hevur ein týðandi leiklut fyri sosialari menning.

Øll børn í dagstovninum skulu hava møguleika at luttaka í virksemi, sum hevur týdning fyri tey. Á tann hátt fáa tey møguleika at uppliva egnan dugnaskap og egnan førleika. Børn, sum fáast við tað, sum vekir teirra áhuga og forvitni, og sum hevur týdning fyri tey, finna styrki í at uppliva egnan førleika, at royna at ganga egnar leiðir, og at finna egnar loysnir. Hetta mennir teirra sosiala førleika.

Eitt av høvuðsmálunum hjá dagstovninum er, at børnini gerast sjálvstøðug og hava gott sjálvsálit.
Dagstovnurin skal geva børnum møguleika til virkna lutøku og at ávirka felagsskapin.
Tað er í vinalagnum, at børnini fáa møguleika at seta seg í støðuna hjá øðrum, læra at samstarva, vísa ábyrgd, samkenslu, og læra at loysa tvístøður.

Sosialur førleiki er at vera virkin og at taka ábyrgd saman við øðrum. Hendan førleika menna børnini í góðum felagsskapi við børn og vaksin, sum er eyðkent av gleði, humor og estetiskum upplivingum. Hetta eigur at vera eitt eyðkenni fyri lívið í barnagarðinum.

Fyri at stuðla góðum sosialum førleikum eigur dagstovnurin at geva børnunum nógvar og fjølbroyttar møguleikar at samstarva

Børn læra sosialan førleika í samskifti við onnur, og tað er í samskiftinum at børnini kunna menna eina góða sjálvsmynd. Børn, sum hava góðan sosialan førleika, hava størri møguleikar at vera virkin í kjaki, at halda samskiftið við líka, laga seg at broyttum umstøðum, og at gera sína ávirkan galdandi. Tað er her at sjálvsálitið, sjálvsfatanin, samstarvsevnini, ábyrgdin og samkenslan fáa møguleika at vaksa.

Arbeiðshættirnir í dagstovninum skulu eggja børnunum til at arbeiða bæði saman við øðrum børnum og starvsfólki. Tí tað er í felagsskapinum, at børn menna sín sosiala førleika.

Góður sosialur førleiki er grundarlagið undir einum innihaldsríkum og góðum lívi hjá tí einstaka.

uppskot

## 9. Pedagogiska umhvørvið

Børn hava rætt til eitt pedagogiskt umhvørvi við áhugaverdum innihaldi, sum gevur íblástur til spæl og læru, og skal geva børnunum fjølbroyttar møguleikar og avbjóðingar.

Dagstovnarnir eru til fyri børnini, og dagstovnurin og alt umhvørvið í stovninum skal fyrst av øllum vera eitt umhvørvi, har børn fáa góðar námsfrøðiligar avbjóðingar.
Tað pedagogiska umhvørvið, sum eisini verður kallað tann triði pedagogurin, er bæði fysisku karmar, s.s. arkitekturur, innrættan, tilfar, og eisini dagsskipan, skipan av tíð, reglur, bæði óskrivaðar og skrivaðar, ósjónligar og sjónligar, rutinur og mannagongdir. Allir hesir tættir hava ávirkan á møguleikar hjá børnum at mennast og mentast, og ávirka sjálvsfatan, samleika og kynsmyndan hjá børnum.

Tað pedagogiska umhvørvið skal geva børnunum góðar og fjølbroyttar møguleikar at skapa seg sjálvan og geva børnunum nógv at hugsa um og takast við. Bæði innan- og uttandurumhvørvið skal vera avbjóðandi, vekja forvitni og undran og viljan at læra. Rúmið skal vera innbjóðandi og týðiliga eitt umhvørvi til virksemi, har nóg mikið er av fjølbroyttum tilfari og amboðum, sum stuðla spæli- og granskingaráhuganum.

Barnið skal kunna skifta millum ymiskt virksemi. Pláss skal vera fyri hugskotunum hjá børnunum til spæl og læru bæði innan- og uttandura. Uttandura skulu børnini fáa góðar møguleikar bæði á góðum spæliplássi, í nærumhvørvinum og úti í náttúruni.

*Innanduraumhvørvið* skal leggjast soleiðis tilrættis, at tað stuðlar samskiftinum millum børn, starvsfólk og foreldur, og gevur fjølbroyttar møguleikar at spæla og at arbeiða, bæði í stórum og smáum bólkum. Umhvørvið má kunna broytast eftir broyttum tørvi og áhuga hjá børnunum.

*Tilfarið* í dagstovninum skal hava fjølbroyttar møguleikar og vekja áhuga og forvitni hjá børnum í ymiskum aldrum. Leikur og tilfar skal vekja áhuga barnanna til nýskapandi spæl og gransking, og skal vera sett soleiðis fram, at tað vekir áhuga og forvitni.

*Garðurin* í dagstovninum hevur stóran týdning fyri spæli- og lærumøguleikarnar hjá børnunum. Har skulu vera fjølbroyttir møguleikar til at granska, røra seg og at gera fjølbroyttar royndir. Garðurin skal vera gjørdur av fjølbroyttum tilfari, sum gevur fjølbroyttar møguleikar.

*Nærumhvørvið* hjá dagstovninum er fjølbroytt og ymiskt, alt eftir hvar dagstovnurin er. Í náttúruni er fjølbroytt tilfar, sum gevur góðar møguleikar til kanningar og granskingar hjá børnum. Mannaskapta umhvørvið gevur eisini eitt fjølbroytt spæli- og læruumhvørvi, sum børn skulu fáa møguleikar at kunna seg um og at læra av.

Pedagogiska umhvørvið hevur skapandi vald á børnum og vaksnum, og barnaáskoðanin speglast aftur í tilfari, innrættan og skipan av tíðini.
Tað hevur týdning, at námsfrøðingar hyggja nærri at, hvussu pedagogiska umhvørvið er skipað og hvørjar møguleikar, avbjóðingar og avmarkingar pedagogiska umhvørvið gevur tí spælandi og lærandi barninum.

uppskot

## 10. Menning og læra

Starvsemið í dagstovninum skal geva børnunum møguleikar at skilja seg og sítt umhvørvi. Granskan, undran, lívsgleði og forvitni eru grundarlagi undir pedagogiska virkseminum saman við royndum, áhuga og tí, sum hevur týdning fyri børn.
Í dagstovninum renna umsorgan og pedagogikkur saman í eina eind í einum virksemi, sum sær til alt barnið allan dagin.
Á dagstovnum læra børn gjøgnum spæl og við luttøku í gerandisliga starvinum bæði innan- og uttandura. Tey læra í samspæli og samskifti við onnur børn, og tá vaksin stuðla teimum og kveikja teirra áhuga.

Dagstovnurin skal støðugt geva børnunum nýggjar avbjóðingar og stuðla fjølbroyttu menningini og læruni hjá børnunum. Menningar- og læruøkini, sum eru nevnd niðanfyri skulu samvirka og treyta hvørt annað. Tey mynda eina heild, og eiga ikki at standa einsamøll.

Menningar- og læruøkini í dagstovninum skulu:

- byggja á eina hugsan um eina heildarmenning hjá barninum
- vera partur av spælinum hjá barninum
- byggja á áhugan og og royndirnar hjá børnunum
- stuðla fjølbroyttari menning út frá fortreytunum hjá barninum
- menna samleika og finna tryggleika hjá børnunum
- menna undran, forvitni og áhuga hjá børnunum til at spæla og læra
- menna sjálvstøðuna hjá børnunum og menna teirra álit á egnar fortreytir
- geva børnunum møguleikar at menna síni evni til at virka í bólki, at klára tvístøður, at skilja rættindi og skyldur og at taka ábyrgd fyri felags reglum
- vera ein partur av menningini hjá børnunum og menna teirra kenslur og virðing fyri øðrum mentanum

### *Samskifti*

Námsfrøðingar og annað starvsfólk skulu skapa umstøður, so at børnini fáa nógvar og fjølbroyttar møguleikar til at:

- tosa saman um ymiskar spurningar
- hoyra søgur, syngja, ríma og kvøða
- gera søgur, yrkja og siga frá
- menna sítt mál og sín samskiftisførleika við fjølbroyttum møguleikum at úttrykkja seg
- menna lesing í breiðum týdningin (literacy) og skilja týdningin av skrivaðum máli
- taka lut í umrøðum um ymiskar heimspekiligar spurningar og síggja fjølbroyttar møguleikar og loysnir

Børn sum hava annað móðurmál enn føroyskt, skulu hava góðar møguleikar at menna sín mentanarliga samleika og fáa høvi at menna bæði sítt egna móðurmál og føroyskt

uppskot

### *Umhvørvi og vísindi*

Í dagstovninum eiga børnini, í samspæli við onnur børn og vaksin, at fáa møguleika at kanna, gera royndir, granska og hugleiða um:

- náttúruvísindi og tøkni í gerandisdegnum
- fyribrigdum í náttúruni
- viðgera, úttrykkja og menna sína fatan av náttúruvísindum og tøkni á fjølbroyttan hátt
- byggja, skapa og konstruera við fjølbroyttum tilfari og amboðum
- menna sína fatan fyri ringrásini í náttúruni og hvussu lívsstílurin hjá menniskjanum, náttúru og samfelag hava ávirkan á hvørt annað
- sína fatan av matematiskum hugtøkum
- tøl, mongdir og teirra týdning
- menna sín førleika at kunna seg í tíð og rúmd
- í samrøðum og frásøgu at fáa møguleika at viðgera grundleggjandi spurningar.

### *Rørsla og fólkaheilsa*

Dagstovnurin skal stuðla vælveruni hjá børnunum við at leggja dent á

- umsorgan
- sunnan mat/góðan kost
- persónligt reinføri
- avbjóðandi rørslur bæði inni og úti
- at njóta friðin og hvíla
- kensluliga javnvág
- samband við onnur og gott vinalag
- menna sínar rørslur og kropsfatan
-

### *Skapandi virksemi og list*

Í dagstovninum skal vera pláss fyri skapandi virksemi, og børnini eiga at fáa møguleikar til at:

- menna síni skapandi evnir
- njóta at taka lut í skapandi virksemi
- gleðast um tað tey skapa
- njóta tónleik og at syngja
- skapa tónleik, myndlist og spæla sjónleik
- arbeiða við fjølbroyttum tilfari
- úttrykkja upplivingar, tankar og royndir á ymiskan hátt í spæli, myndum, formi, rørslum, sangi, rútmikki, tónleiki, dansi og drama
- at taka virknan lut í at skapa barnamentan
- uppliva list á ymsum økjum

Uppskot

## 11. Eftirmeting og menning

Námsfrøðilig eftirmeting hevur til endamáls at seta ljós á pedagogiska arbeiðið. Pedagogiska virksemið, skipanin av arbeiðinum, innihaldi og arbeiðsgongdin verða eftirmett. Eftirmetingin skal taka støði í galdandi lóggávu, stevnumiðum og ársætlanini.

*Pedagogisk eftirmeting* er gróðrarbotnur fyri menning av pedagogiska arbeiðinum og stuðlar menningini av starvseminum, so øll børn kunnu fáa best møguligar fortreytir til at trívast, læra og mennast. Tað eru ikki børnini sum skulu eftirmetast, men skipanin av arbeiðinum, innihaldið og arbeiðsgongdin.

Í eftirmetingini eiga børnini at vera hoyrd. Eftirmetingin skal m.a. hyggja eftir, um starvsemið tekur støði í royndum, fortreytum og áhuganum hjá børnunum. Innlitið hevur stóran týdning fyri framhaldandi menning av virkseminum í dagstovninum.

Menning, mentan og læra barnsins fara fram í samspæli við umhvørvið. Tað pedagogiska virksemið er ávirkað av ytri karmum og krøvum, sum starvsfólkini í dagstovninum hava avmarkaða ávirkan á. Tí eiga eftirmetingar at taka støðið í, hvussu dagstovnurin arbeiðir við pedagogiska virkseminum, hugsjónunum og ætlanunum samsvarandi givnum fortreytum.

Í eftirmetingini skal dagstovnurin taka sjónarmiðini við hjá teimum ymsu áhugapørtunum, - bæði starvsfólkunum, børnunum og foreldrunum, bæði fyri at tryggja fólkaræðið og fyri at fáa breidd og fjølbroytni í eftirmetingina.

*Pedagogisk dokumentasjón* er grundarlag fyri felags umhugsni og refleksjón millum starvsfólk og støði undir námsfrøðiligum kjaki og refleksjón, og sum eftirmeting og planlegging eru grundað á.

Dagstovnurin er ein lærandi organisasjón. Námsfrøðingarnir skulu vera í eini støðugari menning, og mugu hava førleika at eftirmeta bæði egið arbeiði og arbeiðið hjá øðrum. Eftirmeting er grundarlag fyri refleksjón og refleksiteti í arbeiðinum.

*Pedagogiska leiðslan* hevur eina serliga ábyrgd av at skipa fyri, fremja, eftirmeta og menna tað pedagogiska arbeiðið. Hon hevur saman við námsfrøðingunum ábyrgd av at leiða prosessir fyri fakligari refleksjón og menningararbeiði.
Í eftirmetingini skulu starvsfólk gera sær greitt, hvørja ávirkan eftirmetingin og eftirmetingarhættirnir hava á pedagogiska innihaldið.

Uppskot

## 12. Tilrættisleggjan av pedagogiska innihaldinum og ársætlan

Á dagstovninum skal fara fram eitt pedagogisk virksemi sum skal leggjast tilrættis, dokumenterast og eftirmetast. Við støði í námsfrøðiligu stevnumiðunum og áhuganum hjá børnunum skal hvør dagstovnur leggja sítt virksemi til rættis, so børnini fáa góðar møguleikar at mennast og mentast.

Stovnurin er til fyri børnini og áhugin hjá børninum skal vera stýrandi fyri innihaldið og umhvørvið í dagstovninum. Arbeiðið skal leggjast til rættis so innihaldið tekur støði í tí, sum hevur týdning fyri tað, sum børnini halda, og børn og foreldur skulu hava góðar møguleikar at gera sína ávirkan galdandi.

Arbeiði skal leggjast tilrættis, so tað tekur støðið í vitan og kunnleika um menning og læru barnanna bæði sum einstaklingar og sum bólkar.

Dagstovnar skulu hava eina ársætlan. Stovnurin kann harumframt gera ætlanir fyri styttri tíðarskeið, og dagstovnurin kann eisini hava tørv á at gera langtíðarætlanir, fyri at fáa eitt betri heildaryvirlit.

Í ársætlanini skal støða takast til, hvussu dagstovnurin ætlar at arbeiða fram móti námsfrøðiligu stevnumiðunum, og hvørjar pedagogiskar hugsjónir dagstovnurin byggir starvið á. Ætlanin skal kunna um, hvussu dagstovnurin ætlar at arbeiða við umsorgan, uppaling, spæli og læru. Greiðast skal frá, hvat dagstovurin ætlar at arbeiða við komandi árið, s.s. serlig tiltøk fyri børnini, foreldrafundir, fakligir dagar, hvussu samstarvið við fólkaskúlan skal skipast og ymiskar praktiskar upplýsingar um starvsemið á tí einstaka stovninum. Í ársætlanini skal støða takast til, hvussu børnini skulu hava medávirkan á arbeiðið á dagstovninum.

Arbeiðið skal leggjast tilrættis so pláss er fyri frávikum, so børnini kunnu koma framat við sínum hugskotum, og pláss skal vera fyri tí sum knappliga stingur seg upp.

Í ársætlanini skal starvsemið seinasta árið eftirmetast og stingast skal út í kortið, hvussu starvið kann bøtast. Dagligi pedagogiski leiðarin hevur ábyrgd av at ársætlanin verður gjørd, og skal hon gerast í samstarvi við starvsfólk, børn og foreldur.
Ársætlanin skal vera eitt livandi arbeiðsskjal, sum skal eftirmetast og endurskoðast.

Ársætlanin er fyrst av øllum arbeiðsamboðið hjá starvsfólkunum, so tey støðugt kunnu taka støðu til, um tey eru á rættari kós, ella tey skulu seta kósina av nýggjum.
Harumframt er ársætlanin ein fortreyt fyri, at foreldur kunnu gera sína ávirkan galdandi.

Í ársætlanini skal verða greitt frá møguligum menningararbeiði, ið fer fram á stovninum. Menningararbeiðið er eitt miðvíst arbeiði, sum skal føra til broytingar, nýhugsan og at bøta um virksemið.
Áðrenn farið verður undir sjálvt menningararbeiðið, verður ætlan gjørd sum ásetir endamálið við menningararbeiðinum, tíðarætlan, hvussu menningararbeiðið verður skipað, arbeiðshættir og hvussu eftirmetingin verður framd.
Meting skal gerast av, hvat ið er komið burturúr menningararbeiðinum, og royndirnar eiga at koma øðrum dagstovnum til góðar.

uppskot

## 13. Samstarv við heimini

Barnagarðurin hevur eina týdningarmikla uppgávu sum forum fyri børn og smábarnaforeldur, og hann hevur eina serliga uppgávu sum mentanarberi.
Hugtøkini heim og foreldur merkja bæði foreldur og møgulig onnur avvarðandi.

Foreldrini eru høvuðspersónarnir í lívinum hjá barninum. Tey hava høvuðsábyrgd fyri umsorgan, mentan og menning barnsins. Arbeiðið í barnagarðinum skal fara fram í tøttum og álitisvekjandi samstarvi við heimini. Saman við heimunum skal dagstovnurin geva børnunum bestu fortreytir fyri ríkari og fjølbroyttari mentan og menning.

Foreldrini skulu, innan karmin á námsfrøðiligu stevnumiðunum, hava møguleika at hava ávirkan á virksemið í barnagarðinum. Tað er ein fortreyt, at dagstovnurin er týðuligur og greiður í sínum pedagogiska arbeiði, málum og innihaldi, og sínum pedagogisku hugsanum.

Dagstovnurin ger serliga ætlan fyri, hvussu tikið verður ímóti børnum og foreldrum, tá ið børnini byrja á dagstovninum, so tey fáa eina góða byrjan á stovninum.

Øll, sum arbeiða í barnagarðinum skulu hava virðing fyri foreldrunum og hava ábyrgd av at menna eitt álitisvekjandi samband millum starvsfólkini á dagstovninum og familjurnar hjá børnunum.
Starvsfólkini hava ábyrgd av, at øll børn saman við foreldrunum fáa eina góða kunning um mál av týdningi í barnagarðinum. Tey eiga javnan at hava samrøður við foreldrini um trivnað, læru og menning hjá børnunum, bæði í og uttan fyri barnagarðin.
Starvsfólkini eiga at geva foreldrunum møguleika at hava ávirkan á, hvussu arbeitt verður við pedagogisku málunum, og tey eiga at hava sjónarmiðini hjá foreldrunum við í huga, tá ið virksemið verður fyrireikað og útint. Foreldrini eiga at vera hoyrd tá ið virksemið verður eftirmett, og foreldrini skulu hava innlit í, hvussu barnagarðurin arbeiðir og hvørjum barn teirra er upptikið av í barnagarðinum.
Spurningar um trivnað og menning barnsins, og pedagogiska virksemið skulu javnan umrøðast saman við foreldrunum og børnunum.

Foreldrini eiga at vera kunnað um vanligu tagnarskyldurnar sum er galdandi, og um tað serstøku upplýsingarskyldu, sum starvsfólk hava mótvegis barnaverndini.

Barnagarðurin hevur serliga ábyrgd fyri foreldrum, sum tosa eitt minnilutamál og koma frá minnilutamentanum. Starvsfólkini hava ábyrgd av, at foreldrini skilja tað, sum fer fram í barnagarðinum, og at teirra sjónarmið verða hoyrd. At møta foreldrum frá ymiskum mentanum krevur virðing, ansni og innlit.

Uppskot

## 14. Elstu børnini og góð skúlabyrjan

Hvør aldursbólkur og hvørt barn hevur síni serligu eyðkenni, og hvør aldursbólkur og hvørt einstakt barn eigur at fáa avbjóðingar sum hóska til einstaka barnið. Tað árið, barnið fyllir seks ár og skal í skúla komandi skúlaár, eiga námsfrøðingar í samstarvi við børnini at skipa fyri serligum møguleikum og avbjóðingum fyri at virka í bólkum. Hetta er ein liður í teirra yvirgongd úr barnagarði til fólkaskúla og frítíðarskúla.

Eins og fyri alt starvssemi í barnagarðinum, eigur arbeiðið við teimum elstu børnunum at taka støði á barnsins undran og forvitni, har tey fáa góðar møguleikar at arbeiða sum medgranskarar. Tað er grundarlag undir lívlangari læru. Undran og forvitni stimbra børnini at læra, og spælið skal framhaldandi vera grundstøði í øllum virksemi og lærumøguleikum, sum børnini fáa.

Ein góð skúlabyrjan skal fyrireikast, so børnini fáa góðar møguleikar at fella til í nýggja umhvørvinum. At fara úr barnagarði í skúla er stór broyting bæði fyri børn og foreldur. Børnini skulu fáa møguleika at kunna seg við umhvørvið og starvið í skúlanum, og havast skal í huga, at seinasta árið í barnagarðinum og fyrsta árið í skúlanum hava stóran týdning fyri lívlongu læruna hjá børnunum.
Tað hevur týdning at læra og uppaling í skúlanum byggja á tær royndir, sum børnini hava, fyri at skapa teimum tryggleika og nýggjar lærumøguleikar. Tað, sum børnini hava fingist við heima og í barnagarðinum, eigur at vera grundarlagið sum fólkaskúlin og frítíðarskúlin byggja sítt virksemi á.

Dagstovnurin skal stuðla barninum, so tað fær ein góðan gróðrarbotn fyri framhaldandi mentan og menning í frítíðarskúla og fólkaskúla.
Tá tíðin nærkast, at barnið skal byrja í frítíðarskúla og fólkaskúla, hevur barnagarðurin eina serliga skyldu at leggja eina lagaliga ætlan fyri yvirgongdini til rættis. Ætlanin eigur at vera ein partur av ársætlanini hjá bæði dagstovni, frítíðarskúla og skúla. Hon skal taka støði í at gera tað forvitnisligt og áhugavert fyri barnið at fara í frítíðarskúla og fólkaskúla, og eigur hon at vera løgd soleiðis til rættis, at børnini longu frá fyrsta skúladegi fáa so góðar lærumøguleikar, læruumstøður og menningar- og mentanarmøguleikar sum til ber.
Í ætlanini skal greiðast frá, hvussu samstarvið og skifti millum barnagarð, frítíðarskúla og fólkaskúla skulu skipast, so yvirgongdin hjá barninum verður so lagalig sum gjørligt. Starvsfólk í barnagarði, frítíðarskúla og fólkaskúla skulu samstarva og kunna hvønn annan um hugsjónarligt innihald og starvshættir hjá hvørjum øðrum.

Í samstarvinum um yvirgongdina er tað barnið, sum hevur størstan týdning. Øll tiltøk, sum vera sett í verk fyri at lætta um yvirgongdina, skulu taka støði í tí sum er best fyri barnið. Barnagarðurin og skúlin hava eina felags ábyrgd av, at børnini møta tí ókenda við forvitni og við áliti á egnar fortreytir og førleikar og eiga at hugsa um, hvussu teir kunnu lætta um allar tær broytingar sum vera í lívinum hjá børnunum, tá ið tey fara í skúla, bæði viðvíkjandi læru og skúlalívið í síni heild.

Børn eiga á ein góðan hátt at fáa høvi til at siga farvæl við barnagarðin, og at fáa høvi at taka samanum barnagarðstíðina. Arbeiðið eigur at leggjast soleiðis til rættis, at børnini gleða seg at byrja í skúlanum, og at tey uppliva ein samanhang millum barnagarð, frítíðarskúla og skúla.

Uppskot

### *Persónsupplýsingar*

Í nøkrum førum kann tað vera gott fyri menningar- og lærumøguleikarnar hjá børnum, at barnagarðurin letur upplýsingar um tað einstaka barnið víðari til skúlan. Men tað er bert í heilt serstøkum førum, at upplýsingar um børn kunnu latast víðari.

Upplýsingar kunnu bert fara víðari, um foreldrini veita samtykki fyri at lata upplýsingarnar víðari, og foreldur og børn skulu hava innlit og ávirkan á teir upplýsingar, sum verða lætnir skúlanum. Upplýsingarnir skulu leggja dent á førleikarnar hjá børninum, á tað, sum børnini duga og megna, og hvat tey skulu hava serligan stuðul til.

Málsviðgerð skal samsvara við galdandi lóggávu um persónsvernd.

Fyri børn sum hava rætt til serliga tillagaða umsorgar- og læruumhvørvi, hevur eitt tætt samstarv millum barnagarð, frítíðarskúla, skúla og foreldur stóran týdning. Um tað er neyðugt við stórari og umfatandi tilrættisleggjan, má samstarvið fáast í lag í góðari tíð.

uppskot

## 15. Ábyrgdin hjá pedagogiska leiðaranum

Sum pedagogiskur leiðari og leiðari fyri námsfrøðingum og øðrum starvsfólki í dagstovninum, hevur leiðarin tað yvirskipaðu ábyrgdina av at virksemið verður rikið í samsvari við stevnumiðini og alla viðkomandi lóggávu. Leiðarin hevur ábyrgd av námsfrøðiligu dygdini, og harumframt hevur hann eina serliga ábyrgd av, innan fyri givnu karmarnar, at:

- skipa miðvíst og regluliga fyri, fylgja upp, eftirmeta og menna arbeiðið á dagsstovninum
- námsársætlanir verða gjørdar
- gera regluligar námsfrøðiligar eftirmetingar av virkseminum
- námsfrøðingar og annað starvsfólk eru virknir luttakarar í at menna námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovninum og, at geva foreldrum møguleika at vera við til at menna námsfrøðiliga arbeiðið
- at menna arbeiðshættirnar á dagstovninum, soleiðis at børnini fáa møguleika at gera sína ávirkan galdandi
- at námsfrøðiliga umhvørvið í dagstovninum gevur børnunum nógvar og fjølbroyttar møguleikar til menning og læru
- hugburðurin til børnini, soleiðis sum ásett i stevnumiðunum, verður fylgdur, og sæst aftur í øllum virkseminum á dagstovninum
- skapa møguleikar fyri samstarvi við heimini og at foreldrini vera kunnaði um námsfrøðiliga arbeiðið og arbeiðshættirnar
- menna samstarvið við frítíðarskúlan og fólkaskúlan
- fylgja við nýggjari gransking og nýggjari vitan um námsfrøði
- halda uppi eini livandi umrøðu og birta uppundir kjak
- seta í gongd námsfrøðiligt menningararbeiði
- vegleiða starvsfólkini, so øll skilja og fáa innlit í pedagogisku uppgávurnar á dagstovninum
- starvsfólkini støðugt fáa møguleika at menna sín pedagogiska førleika

uppskot